StÍF-Kyndil 27-20 (13-8):

# Mugu hugsa frameftir

**Við sigrinum á Kyndli skrykti StÍF seg endaliga leyst av botnstríðnum í kvinnudeildini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Kvinnuliðini hjá StÍF og Kyndli dystaðust á Skála mikukvøldið, og tó at talan ikki var um nakran oddadyst, so var ein ávísur spenningur, tí undan dystinum vóru bæði liðini partur av stríðnum um at sleppa undan niðastu sessunum í deildini.

Tí stríðnum er StÍF ikki longur partur av. Tær vunnu nevnliga ein tryggan sigur á Kyndli, sum sostatt framvegis er á niðasta plássinum. Ein støða, sum tær tó enn kunnu broyta, tá tær um góðar tvær vikur fáa vitjan av Søljuni.



*Hóast Kyndil royndi at stríðast, so megnaðu tær ongan tíð at skapa veruligan spenning í dystinum mikukvøldið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Lítil spenningur

Grundarlagið undan sigrinum varð staðfest longu fyrsta korterið, tá Kyndil als ikki fekk fótað sær í dystinum. Verjuspælið hekk als ikki saman, soleiðis at StÍF sera lættliga slapp framat opnum málmøguleikum, og heldur í álopspartinum megnaðu tær grønu at seta seg ígjøgnum.

Undan steðginum fingu tær tó pyntað nakað um, men hóast Fríða Petersen fyrstu løtuna av seinna hálvleiki sýndi veruligt stórspæl, so megnaðu liðfelagarnir ikki í nóg stóran mun at fylgja hesum upp.

Eitt skifti kom munurin annars niður í trý mál, men tá StÍF so framdi eitt lítið skift, fekk Kyndil ikki fylgt við meira. Katrin Petersen er kanska ikki so kvik sum nógvar av yngru liðfeløgum hennara, men hon hevur eitt gott bólteyga, og hetta blandað saman við góða strikuspælinum hjá Poulu D. Olsen var nóg mikið til aftur at skræða Kyndilsverjuna sundur, soleiðis at sigurin kundi endaliga staðfestast.

### Framtíðin

Hjá báðum liðunum hevur annars fyri tað nógva verið galdandi, at tey hava nýtt árið í ár til at byggja nakað upp, sum felagið kann grunda framtíðina á.

Heiðursmerki hava ongantíð verið havd á tunguni hjá Kyndli, og síðani StÍF liðið varð skert í heyst, hevur hetta so heldur ikki verið nakað tema her.

Tað er heldur einki at ivast í, at hóast laku úrslitini, so hava fleiri av annars óroyndu leikarunum á liðunum báðum fingið nakrar royndir, sum kunnu koma væl við komandi árini. Sjálvsagt er neyðugt við styrki uttan ífrá, um liðini veruliga skulu gera seg galdandi frammi í oddinum, men bulurin av heimligum leikarum skal eisini megna at bera eitt fitt petti av vegnum, og júst í hesum tykjast bæði Kyndil og StÍF at vera komin væl áleiðis, um sammett verður við, hvussu hesir partar av liðnum vóru fyri við ársbyrjan.

So tað kundi væl hent seg, at tað verður meira at smílast at í so máta hjá viðhaldsfólkunum komandi árini. Men tað krevur so eisini, at leiðslurnar í feløgunum báðum geva kvinnuliðunum somu møguleikar sum mansliðunum við tí útlendska styrkinum, sum krevst til eina oddastøðu.

**Dysturin í tølum**
StÍF-Kyndil 27-20 (13-8)
**Málskjúttar**
StÍF: Poula D. Olsen 6, Anna B. Daneielsen 6, Melica Ergic 5(2), Ninna K. Johannesen 4, Sunfríð B. Jacobsen 3(1), Poula B. Høgnesen 2, Katrin Petersen 1
Kyndil: Annika Thomsen 5, Anja Heinadóttir 4, Randi Wardum 4, Ann-Mari Wang 3, Hildur Mikkelsen 2, Linda Weihe 1, Sabine Frølund 1(1)
Brotskøst: StÍF 4, Kyndil 3
Útvísingar: StÍF 2, Kyndil 2
Dómarar úr Neistanum: Sámal Hansen & Kristian Johansen

VÍF-Stjørnan 25-30 (14-14):

# Undirhaldandi dystur í Vestmanna

**VÍF og Stjørnan leiktu ein undirhaldandi dyst í høllini í Vestmanna mikukvøldið. Oddaliðið úr Klaksvík gjørdi sína skyldu og vann dystin við fimm málum**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Teir okkurt um 200 áskoðararnir, ið vóru til kvinnudystin millum VÍF og Stjørnuna í høllini í Vestmanna mikukvøldið, fingu nakað fyri pengarnar. Liðini bæði spældi ein undirhaldandi dyst, ið var rættuliga javnur og spennandi heilt fram til miðjan seinna hálvleik.



*Eftir greiða sigurin í Vestmanna er tað framvegis Stjørnan, sum hevur fyrimunin í spennandi endaspurtinum um FM-gullið í kvinnuhondbólti*

### Skjótt spæl

Dysturin byrjaði við buldur og braki. Leikferðin var sera høg, og fyrstu løtuna skolaðu málini inn í báðum endum. Longu tá ið bara fýra minuttir vóru leiktir, vóru átta mál, fýra í part, og tað er ikki gerandiskostur.

Ein stórur partur av málunum komu eftir skjótálop. Bæði liðini spældu nógv upp á at spæla skjótt úr verju í álop, og tað gekk eisini væl fyrstu løtuna. Kvinnurnar hjá VÍF fingu eisini nógv mál av strikuni, eftir at Ioana Rapa hevði spælt Irina Radovici leysa. Samanspælið millum tær báðar rumensku útileikararnar hjá VÍF koyrdi serstakliga væl í fyrra hálvleiki, og verjan hjá Stjørnan hevði trupult við at fáa fatur á strikuni hjá VÍF.

Hjá Stjørnuni var spælskiparin Joan Midjord Djordjevic rættuliga sjónlig fyri steðgin. Stuttligt var at síggja, hvussu nógva ferð hon setti á uppspælið hjá Stjørnuni, og eingin ivi er um, at hon er ein tann týdningarmiklasti spælarin hjá Stjørnuni, bæði sum spælskipari og sum málskjútti.

Allan fyrra hálvleik fylgdust liðini, og ongantíð var meira enn tað eina málið á muni. VÍF-liðið tóktist rættuliga væl fyri, og tær tóktust trúgva upp á møguleikan at vinna á oddaliðnum, og harvið skapa sær sjálvum eina lítla vón um føroyameistaraheitið.

### Orkan gekk undan hjá heimaliðnum

Eftir at tað hevði staðið á jøvnum, 14-14, í hálvleikinum, var við spenningi bíðað eftir seinna hálvleiki. Í byrjanini av hálvleikinum gekk eisini javnt á, men einar fimm minuttir inn í seinna hálvleik fór Stjørnan nakað frá VíF. Klaksvíkskvinnur fóru frá 16-16 upp á 16-19 innan fyri fimm minuttir, men heimaliðið gav ikki skarvin yvir. Tomma Petersen avloysti Adelu í málinum hjá VÍF, og tað gav úrslit, tí einans tveir minuttir seinni var heimaliðið komið upp á javnleik, 19-19, við góðari hjálp frá Tommu í málinum.

Henda støða helt sær tó ikki leingi, tí um miðjan seinna hálvleik skrædnaði fullkomiliga hjá heimaliðnum. VÍF hevði brúkt tær somu seks útileikararnar allan dystin, og nú for orkan at ganga undan hjá fleiri av teimum, og tað sást aftur á vøllinum. Eitt nú var Jacklin Durhuus, ið hevði spælt ein sera góðan fyrra hálvleik, útlúgvað, og tað er undrunarvert, at venjarin ikki tók hana út at fáa hvíld, fyrr enn hon sjálv bað um tað.

Eitt tíðarskeið upp á tíggju minuttir um miðjan hálvleik avgjørdi dystin, tí tá fór Stjørnan frá 19-19 upp á 20-26, og so var dysturin avgjørdur. Venjarin hjá Stjørnuni hevði gjøgnum allan dystin skift eitt sindur út á liðnum, so at teir flestu leikararnir fingu eitt sindur av hvíld av og á, og tað gav úrslit. Kvinnurnar hjá Stjørnuni høvdu orku til at spæla skjótt, meðan nógvar á heimaliðnum vóru útlúgvaðar, og hetta viðførdi nógvar óneyðugar feilir og óneyv skot upp á mál.

Tá ið minni enn tíggju minuttir vóru eftir at leika, fekk Stjørnan brotskast. Dysturin var langt síðani avgjørdur, tí oddaliðið úr Klaksvík var á odda 26-20. Katarina Stepanov var sett at skjóta, og hon skeyt bóltin beint í andlitið á Tommu Petersen. Sjálvsagt fekk Tomma ilt, og dysturin bleiv eisini steðgaður. Stepanov fór so av egnari leikhálvu fram til Tommu at biða um orsaka, og tá ið hon var á veg aftur at verja, komu dómararnir yvir og góvu henni reyða kortið, tí teir mettu at hon við vilja skeyt bóltin í andlitið á Tommu. Ein rættuliga ivasom avgerð, serliga tá havt verður í huga, at tað gekk rúm tíð frá at skotið var, til Stepanov fekk reyða kortið. Hetta merkir, at Katarina Stepanov hevur leikbann komandi dyst, men tað hevur neyvan tann stóra týdningin, tí sum venjarin hjá Stjørnuni, Rógvi Nielsen, segði eftir dystin, so møta vit bara Kyndil.

Tað lítlu løtu, ið var eftir av dystinum, kom VÍF nakað fyri seg, so at tá ið teir 60 minuttirnir vóru farnir, hevði Stjørnan vunnið ein rættuliga tryggan sigur 30-25, eftir at tað leingi hevði staðið á jøvnum.

**Dysturin í tølum**
VÍF-Stjørnan 25-30 (14-14)
**Málskjúttar**
VÍF: Ioana Rapa 8(2), Irina Radovici 6, Jacklin Durhuus 5, Sóley Mikkelsen 4(1), Nikolina Eyðbjørnsdóttir 2
Stjørnan: Joan Midjord Djordjevic 7(3), Bára Skaale Klakkstein 5, Alina Olaru 5(1), Katarina Stepanov 5(1), Una Olsen 4, Anna Kristina Samson 2, Annika Ljósstein 2
Brotskøst: VÍF 4(3), Stjørnan 8(5)
Útvísingar: VÍF 5, Stjørnan 4
Burturvísingar: Stjørnan 1
Dómarar: Hannis Wardum og Gunnar Gregoriussen - eru ikki vanir at døma saman, og tað gekk ein løta, áðrenn teir funnu rútmuna, men so var linjan løgd og hildin allan dystin út. Reyða kortið hjá Katarinu Stepanov tóktist eisini ivasamt.






**Ellis- & avlamisheimið í Vágum**

## Frítíðaravloysarar

Søkt verður eftir sjúkrasystrum, sjúkrahjálparum, heilsuassistentum og heilsuhjálparum umframt ymiskum hjálparfólki, ergo- og fysioterepeuti og húsavørði.

Skrivlig umsókn við neyðugum prógvum o.ø. verður at senda til heimið áðrenn 24. mars 2004.

## Ársaðalfundur

verður í

**Tilhaldinum, Tórsgøta 21, Tórshavn, leygardagin 20. mars. kl. 14.00.**

Skrá sambært viðtøkum felagsins.

1. Val av fundarstjóra og skrivara
2. Frágreiðing formansins
3. Framløga av grannskoðaðum roknskapi
4. Framløga av fíggjarætlan fyri komandi ár
5. Val av nevnd og tiltakslimum
6. Val av grannskoðara
7. Ásetan av limagjaldi
8. Mál til viðgerðar
9. Jón Heðin Tróndheim sigur frá evninum »At endurfinna siðbundna handlist
10. Randi Vang og Jónhild Johannesen siga frá um gluggaglæmu
11. Ymiskt

Væl møtt.

**Nevndin**

## Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli

### Skeið í »Alesanderteknikki«

Hósdagin 11. mars til sunnudagin 14. mars verður nýtt skeið hildið í »Alexanderteknikki«.
Skeiðið verður hildið í Tórshavnar Musikkskúla á Frúutrøð 1.
**Lærari** er Carsten Møller.
**Prísur** 900,- kr.
**Tilmelding:**
Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli, tlf. 31 77 55.

### Skeið í máling

15. mai til 21. mai heldur Birger Møller skeið í máling.

Skeið fyri nýbyrjarar verður 15. mai og 16. mai.
**Prísur:** 500,- kr.

Skeið í framhald 17.-21. mai.
**Prísur:** 1.000 kr.

**Tilmelding:**
Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli, tlf. 31 77 55.

## Sangdagur í KFUM & K

**Klaksvík 17.04.2004**

**Hevur tú sungið í kórið í KFUM & K, Klaksvík, so hygg her:**

Leygardagin 17.04.2004 fara vit øll at samlast aftur í KFUM & K Klaksvík. Vit byrja kl. 9.00 um morgunin, og verða allan dagin í KFUM og syngja – vit fáa sjálvandi eisini morgunmat, døgurða og nátturða. Dagurin endar við eini sangløtu í Christianskirkjuni kl. 19.30, aftaná verður kaffi og hugnaløta í KFUM & K.

Allir fyrrverandi kórleiðarir heilt aftur til 1960 eru bodnir við, og koma vantandi allir. Kórleiðararnir leiða hvør sín sang, og allir sangluttakarnir verða savnaðir í eitt stórt felagskór.

Mong av tykkum hava fingið skrivliga innbjóðing, men longri aftur í tíðina, vit skulu, verri er at finna fram til, hvør hevur sungið við. So, um tú ert ein av teimum, ið ikki hevur fingið brævi, er tað als ikki, tí tú er gloymd/gloymdur, tú ert sjálvandi hjartaliga vælkomin.

So… tit, ið hava fingið bræv, og sangarar, ið onki bræv hava fingið, eru øll vælkomin at vera við til dagin. Mint verður á, at freistin at teknað seg til tiltakið er 15. mars 2004. Tilmelding fer fram hjá Jóhannu á tlf. 45 58 37/ 22 31 21.

**Vinarliga**
**KFUM & K í Klaksvík**

Røktar- og umlættingarheimið
Lágargarður

**søkir eftir**

## Summarfrítíðaravloysarum

í tíðini frá 1. juni til 31. august 2004, ella sambært nærri avtalu.

Fyri røktarstarvsfólk: Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar/sjúkrahjálparar.

Somuleiðis verður søkt eftir avloysarum fyri starvsfólkið í køkinum: Økonoma ella køksassistentar, umframt hjálparfólk til at avloysa tey, ið koyra døgurða út til heimabúgvandi pensionistar, tískil er koyrikoyrt neyðugt.

Lønin er sambært avtalu ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfeløg.

Umsóknarfreistin er 23. mars 2004.

Skrivligar umsóknir við neyðugum prógvum skulu sendast leiðaranum.

**Lágargarður**
**Stoffalág 84**
**box 1188**
**110 Tórshavn**

## Starvsfólk til Rókina

Á Rókini, ið er bústovnur undir Almanna- og Heilsumálastýrinum, eru 2 fulltíðarstørv leys at søkja frá 1 Apríl 2004.

Rókin er ein landsstovnur fyri 5 børn/ung við m.a. skúla- og sosialum trupulleikum.

Vit vænta, at tey ið sett verða, eru før fyri at arbeiða í sera tøttum samstarvi við bæði vaksin og børn og eru opin fyri nýggjum pedagogiskum avbjóðingum.

Fólk, ið sett verða, skulu hava viðkomandi útbúgving/royndir og verða lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu verða stovninum í hendi í seinasta lagi tann 21. mars. 2004

Nærri fast at vita um størvini við at venda sær til Súsan Johansen, leiðara, á tlf. 318914.

**Rókin**
Garðsøta 31
160 Argir



## Ársaðalfundur

verður í

**Tilhaldinum, Tórsgøta 21, Tórshavn, leygardagin 20. mars. kl. 14.00.**

Skrá sambært viðtøkum felagsins.

1. Val av fundarstjóra og skrivara
2. Frágreiðing formansins
3. Framløga av grannskoðaðum roknskapi
4. Framløga av fíggjarætlan fyri komandi ár
5. Val av nevnd og tiltakslimum
6. Val av grannskoðara
7. Ásetan av limagjaldi
8. Mál til viðgerðar
9. Jón Heðin Tróndheim sigur frá evninum »At endurfinna siðbundna handlist
10. Randi Vang og Jónhild Johannesen siga frá um gluggaglæmu
11. Ymiskt

Væl møtt.

**Nevndin**



## Ársaðalfundur

**hjá Fjallbrúður**
verður
**í Framtíðini 3. apríl kl. 16.00**

Skrá sambært lógum felagsins.

Um fundurin ikki er viðtøkuførur, verður eykaaðalfundur hálvan tíma seinni.

**Arbeiðskvinnufelagið Fjallbrúður**